## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Óli Hammer: – Alt skal gerast betur

Nýggja flutningsfelagið Smyril Blue Water hevði í farnu viku móttøku umborð á Norrønu.

Óli Hammer, nevndarformaður í Smyril Blue Water, segði, at málið er at gera alt betur.

- Skjótheit og álit er okkara vørumerki, segði Óli Hammer á móttøkuni. Smyril Blue Water er eitt flutningsfelag, sum Smyril Line og Blue Water hava stovnað. Smyril Line eigur helvtina av felagnum, og Blue Water hjá Kurt Skov eigur hina helvtina.

- Vit ynskja at gangnýta okkara felags synergi'ir í nýggja felagnum, sigur Kurt Skov, stjóri í Blue Water, sum leggur afturat, at tað er týdningarmikið at undirstrika, at høvuðssæti hjá Smyril Blue Water er í Føroyum.

Smyril Blue Water opnar eisini eina skrivstovu í Íslandi, og felagið væntar sær nógv av íslandssiglingini. Samstundis skal ein farmaflogdeild latast upp.



*– Álit er okkara vørumerki, segði Óli Hammer í røðu síni. Uttast vm. síggjast Heðin Joensen, stjóri í Smyril Blue Water og Kurt Skov, stjóri í Blue Water*
*Mynd: Jens Kr. Vang*



*Nógv fólk var samankomið umborð á Norrønu*



*Kurt Skov heilsar upp á Klæmint Weihe, formann í Smyril Line*


## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu,
tá kæra mamma og systir okkara

**Ellen Elisabeth Olsen**
(fødd Nolsøe) Neslið, Vágur

andaðist og varð jarðað.

Eina hjartans tøkk til tykkum, ið vóru um hana
hennara síðstu tíð.
Tøkk til prest, kirkjutænara, sangarar og berarar.
Tøkk fyri kransar, blómur og gávur
til Eldrasambýlið í Vági.
Tøkk til tykkum, ið fylgdu henni
til hennara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Hans**
**Poula, Jákup og Hans**




*Tey lurta við áhuga eftir tí, sum borið verður fram av teim leiðandi persónunum í nýggja felagnum*